## Full ferð á kinverska búskapinum



Bara fyrstu seks mánaðirnar í ár hevur búskaparvøksturin í Kina verið heili 10,9%. Hetta er meira enn búskaparvøksturin var í alt 2005, og alt bendir á, at heimins fólkaríkasti búskapur bara heldur á fram at vaksa. Ikki minst takkað verið einum ógvusligum vøkstri í privatu nýtsluni. Men tað eru ikki øll, sum eru eins fegin um vøksturin. Eitt nú hava amerikanskir politikkarar funnist at kinversku starvsfeløgum sínum, sum teir siga tilvitað undirmeta kinverska gjaldoyrað fyri at skunda undir útflutngin. Búskaparvøksturin hevur eisini skapt eina inflatión, men hendan hevur higartil í ár verið avmarkað til 1,8%.

## Stress-útgjald trífaldast

Donsku tryggingarfeløgini ávara nú móti vandamiklu gongdini um stress á arbeiðsplássum. Útgjøldini frá tryggingunum sum endurgjald fyri stress á sálarligar sjúkur eru trífaldað seinastu fimm árini, og eingi tekin eru um, at hesi minka. Hjá Danica Pension sigur Jens Christian Nielsen, figgjarfrøðingur, at talan er um eitt fyribrigdi, sum øll orsøk er til at vera á varðhaldi ímóti. Ikki minst, tí talan er um alsamt yngri fólk – aloftast við góðum útbúgvingum – sum verða rakt.




# Ráðstevna góð fyri oljuleiting við Føroyar

**– Vit fingu so nógva spennandi og nýggja vitan á oljuráðstevnuni herfyri, at hetta kann skunda munandi undir oljuleiting á landgrunninum heldur Heri Ziska, ein av okkara fremstu serfrøðingum, tá tað um undirgrundina ræður**

OLJURÁÐSTEVNA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Heri Ziska var ein av oddamonnunum aftanfyri stóru oljuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum herfyri. Hann er ein av okkara fremstu serfrøðingum, tá tað um føroysku undirgrundina ræður. Tað var heldur einki minni enn eitt bragd, at hann saman við øðrum góðum fólkum hjá Jarðfeingi megnaði at fáa nærum 100 útlendskar serfrøðingar og granskarar til Føroya, nú spennandi boring fer fram her.

Og tað er ein fegin Heri Ziska, sum nú eftir ráðstevnuna hyggur fram í tíðina. Hann situr framvegis og tyggir uppá tey mongu áhugaverdu innleggini, sum vórðu hildin á ráðstevnuni.

–Hetta rigggaði sera væl við nógvum spennandi fyrilestrum, og so kom eisini nógv nýggj vitan fram. Hetta er sera gott fyri tað føroyska økið sigur Heri, sum heldur,at ikki minst fyrilesturin um Rosebankfundið hinumegin markið var sera áhugaverdur. tí tað er nústaðni nú, at fólk hava fingið at vita, at tað er ikki oman á ella undir basaltinum, at olja og gass eru funnin. Tað er harafturímóti inni í sjálvum basaltinum.

– Vit á Jarðfeingi eru so eisini farin at hyggja eftir hesi vitan, sum ger okkara øki upppaftur meira áhugavert. Vanliga koma sedimentini okkara megin frá einum basaltumráði, og tí hava vit higartil ikki hildið, at tey eru serliga góð. Nýggja vitanin merkir, at tey eru nóg góð til, at vit saktans kunnu brúka tey til reservoir. Tvs. at vit fáa nú møguleika at leita eftir olju í væl yngri fláum, enn vit fyrr hava gjørt. Har man fyri hevur sagt, at har basaltið kom, var einki at fara eftir, síggja vit nú, at har kann vera nakað at fara eftir.

**Grønland og Føroyar**

Fleiri av fyrilestrarhaldarunum tosaðu um jarðfrøðiliga sambandið millum Føroyar og Grønland í gamlari tíð. At Grønland og Føroyar hava ligið tættari saman hevur verið mett sum ein fyrimunur fyri at finna olju her hjá okkum. Seinastu kanningarnar eru uppaftur meira bjartskygdar hesum viðvíkjandi, tí nú vísir tað seg, at sediment frá Grønlandi finnast í føroyskum øki langt upp í tíðina. Tað vísir seg, at sediment eru komin úr Grønlandi líka til og við ta síðstu fasuna av vulkanismu í Føroyum, so vit hava fingið longt tíðina, har vit kunnu fáa góð sediment norðanífrá eisini langt upp í tíðina sigur Heri Ziska. Hetta eru týðandi fyritreytir fyri at finna olju um okkara leiðir.

Heri Ziska sigur, at tess meira vit fáa at vita um basaltið og tað, sum undir basaltinum, tess størri møguleikar eru fyri, at okkara økið er áhugavert. Alt tað, sum man fyrr helt ikki bar til orsakað av basaltinum, tá ber kanska til kortini. Tí blívur føroyska økið meira og meira spennandi. Basaltið er ikki ein so negativur faktorur longur, sum tað hevur verið.

– Hvat var fyri teg mest hugvekjandi á ráðstevnuni?

–Tað var, at fólk byrja at síggja, at tað føroyska økið, tvs. strukturar og skap, er nokkso gamalt. Tað hevur sera stóra ávirkan á, hvar tú hevur sediment og hvar tú kanst hava reservoir. Hetta var nakað av tí, sum eg sjálvur legði fram á ráðstevnuni og áhugavert var at fáa tað váttað av øðrum eisini. Hetta er so eisini nakað, sum gongur beint ímóti tí, sum sum tú lesir í litteraturinum, so her er við at koma vend í, tíbetur. Og tað hevur nógv at siga fyri okkum.

Avleiðingin er nú tann, at nógv fara heim aftur og hugsa umaftur um alt hetta. Taka ta vitan tey hava fingið her til sín og byggja hana út. Vit hava fingið útvekslað vitan uppá einar tveir dagar, sum tað kanska vanliga tekur upp til 5 ár at fáa útvekslað. Tvs. at vit nú eru har vit kanska kundu verið um fleiri ár. Nú fáa vit tað út, meðan alt er spennandi í mun til sjálva oljuleitingina.

Richard Hardmann, oljuveteranur:

# Vísur í at oysku un



**– Her eru gjørd stór framstig, og vit skilja betur undirgrundina, síðani farið varð undir at kanna Føroyaøkið miðskeiðis í 90-unum. Eg eri rættiliga vísur í, at olja verður funnin í føroyska økinum.**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Hetta sigur ein av veteranunum í oljuleitingini við Føroyar, Richard Hardmann. Sjálvur var hann ein av fyrstu útlendsku jarðfrøðingunum, sum komu til Føroya fyrst í 90-unum at seta skjøtil á leitingina her. Hóast hann er farin frá við eftirløn, so er hann enn virkin í oljuvinnuni sum ráðgevi fyri bæði føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum og onnur oljufeløg. Hann sigur seg vera meira sannførdan um, at olja er í undirgrundini í dag, síðani hann og starvsfelagarnir í Amerada Hess gjørdu støðuna upp um, at Marjunfundið var ikki lønandi. Og orsøkin til hesa stóru broytingina, frá Marjunfundinum og fram til í dag, sigur Richard Hardmann vera, stóra fundið á bretskum øki, Rosebank/Lochnagar, hinumegin markið. Hann heldur, at góðir møguleikar eru fyri tí teir á oljumáli kalla "mirror image" tvs. at undirgrundin okkara megin markið kann vera ein spegilsmynd av henni hinumegin, har Rosebankkeldan liggur.

Orsøkin til at bjartskygni er størri í dag er ein samanrenning av betri seismikki, betri forstáilsi av jarðfrøðini og sum heild ein sannførandi kensla av, at her finst olja.

Richard Hardmann heldur, at tað verður neyugt at brúka nógvar pengar fyri at finna oljuna, og fara góð tíðindi at koma sohvørt,

# Icelandair verður helst selt

Danska blaðið, Børsen,endurgav í gjár Financial Times, sum veit at siga, at FL Group er í ferð við at selja Icelandair, sum er størsta flogfelag í Íslandi.
Keypari er sambært enska blaðnum ríkmaðurin Ólafur Olafsson, sum sigst vera til reiðar at gjalda millum 3,9 og 5,5 milliardir danskar krónur fyri Icelandair.
FL Group eigur eisini danska flogfelagið Sterling, og tað ljóðar, at felagið eisini ætlar at selja tað, um eitt hóskandi boð kemur.

# OPEC trýstir oljuprísin

Óttin fyri at OPEC-londini fara at skerja oljuframleiðsluna fær nú oljuprísin at hækka. Mánamorgunin kostaði ein tunna av olju $ 63,18 sambært Bloomberg-vísitalinum, og er hetta 27 cent meira, enn við endan av seinastu viku. Europiska Brent-vísitali hevði ein prís á $ 62,70 fyri tunnuna, og er hetta eitt fall í mun til prísin í seinastu viku. Amerikanskri eygleiðarar halda, at OPEC-londini skerja framleiðslu, so prísurin verður verandi oman fyri $ 60 fyri tunnuna.



# olja er í før-dirgrundini



*Ein av veteranunum frá oljuleitingini við Føroyar, Richard Hardmann, var við á oljuráðstevnuni herfyri*
*Mynd Jan Müller*

so fara enn fleiri eygu at fylgja við. So vísindin og betri vitanin hava gjørt, at bjartskygni er vaksið aftur saman við fundunum í bretskum øki, Rosebank og Cambo.

– Men man kann ikki blíva við hava vóni í allar ævir uttan at finna nakað?

– Tað er rætt.

– Men hvar er so pínumarkið?

– Vit sóu tað á ráðstevnuni. Leitingin fer at vera avmarkað til tann eystara partin av Føroyum. Vit fara ikki hinvegin. Her eru tær røttu jarðfrøðiligu umstøðurnar. Í hvussu er halda vit, at fyritreytirnar eru steðar, og tað er eisini grundarlagið undir teimum modellum, sum arbeitt verður við.

## William, Anne Marie og so Rosebank

– Hvat var mest áhugavert á ráðstevnuni?

– Eg haldi ætlaninar um nýggjar boringar eru sera áhugaverdar, eitt nú William brunnurin hjá BP næsta ár og Anne Marie brunnurin hjá Eni og Føroya Kolvetni í 2008. Eg haldi eisini, at tað var sera áhugavert at hoyra Statoilfólkini greiða frá basaltinum.

Richard Hardmann arbeiðir fyri føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum. Hann heldur, at loyvini, sum felagið fekk tillutað í 2. útbjóðing eru sera áhugaverd, men av tí at AP er eitt lítið felag, so vónar hann, at onnur feløg fara at vísa áhuga fyri loyvunum hjá AP. Tað er so knýtt at leiting og kanningum í øllum økinum sum heild. Men teir tríggir brunnarnir, sum í næstum verða boraðir á Rosebankfundinum kunnu eisini fáa stóra týdning fyri loyvini hjá AP. Somuleiðis leitar Amerada Hess í løtuni eftir palli at bora ein ella tveir avmarkingar- og metingarbrunnar á Cambofundinum skamt frá markinum. Eydnast tað so kann tað merkja, at hetta økið av álvara verður latið upp.

– So Rosebank og Cambo á breskum øki kunnu væl blíva duraupplatarar fyri føroyska landgrunnin eisini?

– Tað er góður møguleiki fyri tí.

# Rosebank oljukeldan er inni í basaltinum

**– Vit vita ikki enn, um talan er um eina lønandi oljukeldu, men sjálvir halda vit, at her er talan um eitt lønandi fund sigur ein av fremstu serfrøðingunum hjá Chevron, D. Helland-Hansen. Oljukeldan er inni í basaltløgunum**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Eingin stólur var tómur í stóru høllini í Norðurlandahúsinum, tá D. Helland-Hansen frá oljufelagnum Chevron í farna mánað greiddi frá oljufundinum skamt frá føroyska markinum, nevnt Rosebank/Lochnagar. Hetta er tann oljukeldan, allur oljuheimurin nú bíðar spentur eftir at frætta meira um.

– Vit vita ikki enn, um talan er um eina lønandi oljukeldu, men sjálvir halda vit, at her er talan um eitt lønandi fund sigur ein av fremstu serfrøðingunum hjá Chevron, tá tað um Atlantsmótið ræður. D. Helland-Hansen sigur, at komandi mánaðir fara at siga okkum, um talan veruliga er um eitt so stórt fund, sum metingarnar higartil vilja vera við. Tað skulu so komandi avmarkingarbrunnar avdúka sigur hann við Vinnusíðurnar. Tað er eisini tí Chevron brúkar so nógvar pengar uppá komandi boringar. Fyrilestur hansara var sera áhugaverdur og varð eisini greitt frá fundinum í smálutum. Tað, sum er so áhugavert, er, at oljukeldan er funnin inni í sjálvum basaltinum, í løgum, sum goyma olju og gass.

Verður Rosebank verkætlanin væleydnað og er møguleiki at fáa fatur í boripall fer Chevron undir at bora fleiri leitibrunnar vestan fyri Hetland komandi árini. Í hesum sambandi hevur felagið eisini gjørt avtalu við Stena Drilling um at byggja eitt spildurnýtt boriskip, sum fyrst og fremst er ætlað til at bora á Atlantsmótinum, herí eisini við Føroyar.

– Men verður Rosebank ein succes, hvat vit rokna við, so fer tað eisini at lata hurðarnar upp til alt hetta stóra økið. Útbygging av Rosebank fer at skapa eitt undirstøðukervi, sum kann gagnnýtast av øðrum komandi fundum í hesum økinum. Og her koma fund við Føroyar eisini inn í myndina sigur D. Helland-Hansen.

Hann vísir á, at í besta føri kann Chevron í 2008 gera av, um tað skal fara undir at byggja út Rosebank, og so ganga nøkur ár, til oljan kemur upp. Komandi avmarkingarbrunnar verða boraðir frá oktober í ár til fram móti sumri í 2007.




*Chevronserfrøðingur: -Verður Rosebankfundin ein succes, so kann tað lata hurðarnar upp til føroyska økið eisini.*